**Reglugerð fyri**
**TILTAKSGRUNN STARVFELAGSINS.**

**§ 1**
Navn grunsins er Tiltaksgrunnur Starvsfelagsins, og endamál hansara er at styðja limir Starvsfelagsins í verkfalli ella arbeiðssteðgi í sambandi við lønar- og sáttmálatrætur.

**Stk. 2.** Grunnurin hevur tó heimild til at veita felagnum rentufrí lán til keyp, viðlíkahald og um- og ella útbygging av fastari ogn, og kann sjálvu seta pening í fasta ogn, sum verður brúkt til felagsins virksemi.

**§ 2**
**Stk. 1.** Ein triðingur av inntøkum felagsins verður settur í grunnin. Nevndin kann tó, tá tað verður mett at verða neyðugt, hækka ella lækka inngjaldið í eitt frammanundan nærri avmarkað tíðarskeið. Avgerðin verður at leggja fyri fyrstkomandi aðalfund til góðkenningar.  .

**Stk. 2.** Felagið flytur hvønn mánaða hóskandi peningaupphæddir til grunnin.

**Stk. 3**. Í sambandi við uppgerðina av ársroknskapi felagsins verður reguleringin av gjaldinum til grunnin at fara fram samsvarandi tí, sum nevndin hevur ásett.

**§ 3**
**Stk. 1.** Grunnurin verður stjórnaður av nevnd Starvsfelagsins.

**Stk. 2.** Felagsskrivarin er samstundis kassameistari grunsins, og galda fyri virki hansara tær reglur, sum nevndar eru í § 11 í felagslógunum.

**Stk. 3.** Nevndin stendur aðalfundinum til svars fyri rakstrinum av grunninum.

**Stk. 4.** Allar avgerðir grunninum viðvíkjandi verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta sambært § 15, stk. 3, í felagslógunum.

**Stk. 5.** Til útgjaldingar úr grunninum krevst nevndarsamtykt, og at formaðurin saman við felagsskrivaranum ella einum nevndarlimi skrivar undir.

**§ 4.**
**Stk. 1.** Peningaogn grunsins verður sett inn á konto í einum ella fleiri av teimum føroysku peninga-stovnunum, ella hvar grunnurin á tryggan hátt fær hægstu rentu.

**Stk. 2.** Tá peningaogn grunsins er komin upp á tvær mánaðarlønir til allar limirnar, verður fyribils ikki settur meira peningur í grunnin uttan so, at nevndin sambært endamálsgrein felagsins metir hetta verða neyðugt.

**§ 5.**
**Stk. 1.** Nevndin avgerð í hvørjum einstøkum føri, nær, í hvønn mun og hvussu útgjald úr grunninum skal fara fram í samband við umstøður, sum nevndar eru í § 1.

**Stk. 2**. Nevndin kann eisini avgerða bert at bjóða limunum lán úr grunninum í samband við tær í § 1 nevndu umstøður.

**Stk. 3.** Teir limir, sum, undir verkfalli, ikki gera eftir boðum nevndarinnar, hava ikki rætt til útgjald úr grunninum.

**§ 6.**
**Stk. 1.** Inngjøldini til grunnin eru ogn grunsins, og limir kunnu ikki fáa útgjald úr grunninum í samband við útmelding úr felagnum.

**§ 7.**
**Stk. 1.** Fyri grunnin verður førdur serstakur roknskapur. Roknskaparárið er tað sama sum roknskaparár felagsins.

**Stk. 2.** Grannskoðarar felagsins grannskoða eisini roknskap grunsins eftir somu reglum sum í § 12, stk. 7 í felagslógunum.

**Stk. 3.** Tann grannskoðaði roknskapurin skal leggjast fram til góðkenningar á ársaðalfundi grunsins, sum altíð er samstundis um ársaðalfundur felagsins.

**§ 8.** Grunnurin kann bert takast av eftir reglunum í § 18 í felagslógunum.

**§ 9**
Henda reglugerð frá 28. februar 1977, seinast broytt 26. februar 2000, seinast broytt í mars 2013.

*Seinast broytt: á aðalfundi Starvsfelagsins 6. mars 2021. Navnabroyting*